# GÍ meira málsøkið

*2. deild: Hóast NSÍ hevði leikligu yvirvágna, so vóru gøtumenn meira málsøknir, og málini telja meira enn gott spæl*



*NSÍ sðældi, men GÍ skoraði, og málini telja*
***Mynd: J. Jacobsen***

JÁKUP MØRK

GÍ-NSÍ 4-2 (1-2)

Dysturin í Sarpisgerði leygardagin var ein av teimum, har talan var um eykaleikarar hjá báðum feløgum, sum meira ella minni skulu halda formin við líka í 2. deild.

Ikki tí, sjálvandi vilja menn altíð vinna, tá farið verður á vøllin, men hinvegin er tað ikki av altavgerandi týdningi fyri hesi lið, har aðalsetningurin aloftast er at varveita sessin í deildini, so eykamenninir hjá 1. liðshópinum kunnu spæla á so høgum støði sum gjørligt.

**Runavíkingar gott spæl**
Sum vera man, so hava úrslitini hjá báðum feløgunum verið nakað óstøðug. M.a. tí samansetingin av fólkinum kann broytast rættuliga nógv, orsakað av broytingum á besta liðnum.

NSÍ verður tó sagt at teljast millum liðini, sum kanska spæla besta fótbóltin í deildini, og í Gøtu góvu teir aftur prógv um hetta.

Tað vóru nevnliga runavíkingarnir, sum høvdu bóltin nógv meira enn vertirnir, og fyrsta partin av hálvleikinum gav hetta eisini úrslit í tveimum málum, sum Fróði Jóanesarson og Bergur Hansen skutu fyri gestirnar.

Hóast NSÍ framhaldandi hevði lekliga yvirvág, so eydnaðist tað kortini Jan Skoradal at minka um munin stutt fyri steðgin, tá hann var hægstur eftr hornaspark.

**GÍ vandamikið**
Í seinna hálvleiki helt gongdin fram, men nú var tað sum um runavíkingarnir vóru gandaðir, tá teir nærkaðust málinum.

Nógv og skjótt smáspæl úti á miðjum vølli var á skránni, men sjáldan ella ongantíð gav hetta úrslit í góðum málmøguleikum.

Jan Skoradal skeyt eisini GÍ upp á javnt, og nú kom rættuligur fjáltur á runavíkingar.

Leikliga yvirvágin var nú eisini um at hvørva, og tá altíð vandamikli Heini Heinason legði vertirnar á odda, var líkt til at dysturin at kalla var avgjørdur.

Soleiðis skuldi eisini vísa seg at vera, men ikki fyrr enn Magnus Dalbø hevði skotið eitt heldur merkisvert mál, varð dysturin blástur av. Eftir skot frá GÍ leikara var bólturin á veg út til hornaspark. Tað eydnaðist kortini verjuleikara at forða fyri hesum, men tá hann beindi bóltin inn aftur á vøllin, gav hann samstundis Magnusi opnan málmøguleika úr stuttari fjarstøðu, og hann takkaði bara fyri.

**Skotvenjing**
Dysturin endaði sostatt við sigri til gøtumenn, og uttan at gera stórvegsi meira burtur úr, so kann helst staðfestast, at teir eru fegnir um stigini.

Í øllum førum er líkt til, at gøtumenn uttan stórvegis trupulleikar megna at standa seg í deildini.

Tað gera runavíkingar helst eisini, men hóast hetta, so man skotvenjing og uppspæl til møguleikar standa ovarlaga á skránni, ein av komandi venjingardøgunum.



*Eins og vanligt, so hava sumbingar ongar ætlanir um at geva skarvin yvir, og nú eru fyrstu stigini komin til høldar*
***Mynd: Áki Bertholdsen***

# Loksins bragdaði

*1. deild: Eftir stórtapið fyri viku síðani, reistu sumbingarnir seg aftur, tá teir á heimavølli bardu seg til trý týdningarmikil stig móti felagsliðnum úr Vágoynni*

JÁKUP MØRK

Sumba-FS Vágar 1-0 (0-0)

Sumbingar vóru fullgreiðir um setningin, tá teir dýra biðjudag tóku móti gestunum úr Vágoynni.

Tap móti samansetta liðnum hevði viðført, at Sumba at kallað varð isolerað í botninum av bestu deildini, og hóast teir áður hava megnað at bart seg upp úr at kalla vónleysum støðum, so var einki at taka seg aftur í, at teir helst vildu tryggja sær, at gloppið upp til næstu liðini ikki gjørdist ov stórt.

Støðan hjá vágamonnum var tó lítið mætari, tí tríggir teir fyrstu landskappingardystirnir høvdu bert kastað eittans stig av sær, og skal sessurin í deildini varveitast, er Sumba helst eitt av teimum liðum, sum stig skulu fáast frá.

**Ikki nakað serligt spæl**
Hetta merkti eisini dystin Suðuri á Krossinum rættuliga nógv. Úr sumba frættist, at talan í stóran mun var um sparkarí, har liðini bæði við longum bóltum royndu at skapa vandamiklar støður frammi í álopinum.

Tað tykist eitt sindur løgið, at vágaliðið, sum als ikki hevur fólk til slíkt spæl, skuldi detta í hesa grøv, og hetta ásannaði liðskiparin á liðnum eisini eftir dystin. Ari Thomassen helt, at teir onkursvegna gloymdu alt um at spæla fótbólt, og hetta viðførdi eisini, at vágamenn so at siga ongan málmøguleika skaptu sær í samfullar 90 minuttir.

Áleypararnir báðir, Birgir og John, eru fínir fótbóltsleikarar, men styrkin hjá teimum er ikki í luftrúminum, men heldur á jørðini, har teir kunnu gera nýtslu av teknikkinum og skjótleikanum, sum eru teirra vørumerki.

Spælið hjá sumbingum var sum so heldur ikki av tí besta, men í mun til gestirnar, so stríddust sumbingarnir um hvønn tann einasta bólt, og hetta viðførdi eisini nakrar spentar støður framman fyri vágamálið, men Remi í vágamálinum megnaði hvørja ferð at verja fyri, so mál ikki spurdust burturúr.

Í seinna hálvleiki helt sama skilið fram. Sumbingarnir trýstu alt teir vóru mentir, og eitt korter inn í hálvleikinum fingu teir eisini løn fyri stríðið.

Ein langur bóltur varð sendir inn í brotsteigin, har Sasa og Darius vóru staddir. Lítli jugoslavin vann á stóri litavanum, og einsamallur við málverjanum kundi hann leggja sumbingar fram um.

Sami Sasa hevði stutt fyri havt eitt fríspark, sum tók í stongina, og eftir hvat skilst, so eru sumbingar væl nøgdir við at hava fingið nýggja leikaran í hópin.

Hóast teir nú vóru aftan fyri, so raknaðu gestirnir á ongan hátt við, og uttan stórvegis hóvasták kundu sumbingar sostatt fáa seinasta hálva tíman at ganga, soleiðis at áður tómi stigaposin brádliga gjøridist nakað tyngri.

**Fegin um avrikið**
Eftir dystin helt venjarin hjá sumbingum, Milan Cimburivic, at leikarar hansara veruliga høvdu spílað seg út í dystinum.

- Vit vóru í eini sera truplari støðu, og satt at siga, so var tað ikki fyrr enn í seinastu løtu, at avgerin um liðuppstillingina varð tikin. Eirikur Joensen hevur ikki vant í nærum tvær vikur, men týdningur hansara fyri liðið er ómetaliga stórur, og við eitt lítið sindur av hepni, kundi hann eisini havt skorað okkurt mál, segði ein glaður venjari. Harumframt greiddi hann frá, at Trygvi Nielsen hevði ligið sjúkur alla vikuna, umframt at Hallur Dam Joensen heldur ikki tað serliga gott undan dystinum.

Viljin til at vinna var tó somikið stórur, at teir allir vóru til reiðar at tørna út til dystin, og úrslitið hevur við sær, at sumbingar endiliga kunnu lyfta seg av niðasta sessinum á stigatalvuni.

- Nú fingu vit trý sera týdningarmikil stig í dag, og kunnu vit eisini fáa nakað burturúr dystinum komandi vikuskifti, tá B71 kemur á vitjan, so sær tað kanska slettis ikki so galið út, helt sumbiarvenjarin fyri.

**Skulu skjótt vinna**
Vóru sumbingar glaðir um dystin, so var lagið einki serligt á vágaliðnum eftir dystin. Ari Thomassen, sum er liðskipari á liðnum, segði eftir dystin, at tað var sum hugurin til at spæla als ikki er til staðar í løtuni.

- Vit byrjaðu kappingarárið við at tapa á Toftum, hóast vit høvdu fleiri góðar møguleikar, og síðani spældu vit javnleik á heimavølli móti NSÍ, har vit væl kundu havt vunnið dystin. Hetta hevur viðført, at hugurin til at spæla er linkaður nakað, og at vit síðani vórðu smurdir av í Gundadali hevur ikki gjørt støðuna betri, heldur liðskiparin.

Hann hevur tó góðar vónir um kappingarárið. - Vit gerast betri fyri hvønn dyst, sum vit spæla í fyrstu deild, tí leikararnir verða alsamt meira vanir við høgu leikferðina, og sjálvir haldi eg, at vit eiga at kunna halda okkum í deildini, sigru Ari.

Hann er tó eisini fullgreiður um, at skal hesin setningurin røkkast, er neyðugt at fáa nøkur stig inn á kontina. Fyrstkomandi møguleiki fyri hesum er komandi vikuskiftið, tá vágbingar koma á vitjan. Einki er at taka seg aftur í, at talan er um eina torføra uppgávu, men hinvegin so eru vágamenn meira ella minni tvingaðir at vinna dystin, og hetta átti eisini at merkt avrikið hjá leikarunum í dystinum.

**Sumba-FS Vágar 1-0 (0-0)**
1-0: Sasa Tomajek 60.

Dómari: Jens Petur Brattalíð

**Sumba:**
Eigil Olsen, Tryggvi Nielsen, Marlon Kjærbo, Mortan úr Hørg - Nikola Biberdzic, Hallur Dam Joensen, Spasoje Biberdzic, Hans Jacob Thomsen, Sasa Tomajék - Eirikur Joensen, Rene Thomsen

**FS Vágar:**
Remigius Mykoliunis - Emil Hentze, Darisu Magdasauskas, Zylvanuis Zudis, Rimvydas Bakus - Sonni Johansen, Albert Ari Thomassen, Hannus Olsen, Tór-Ingar Akselsen - John Johansen, Birgir Joensen



# Endiliga eydnaðist tað hjá GÍ

*1. deild: Avrikið var einki at rópa hurrá fyri, men gøtumenn fegnaðust um, at tað fyri fyrstu ferð í fimm ár eydnaðist at fáa fulla úrtøku í Runavík*



*Fyrst og fremst vórðu tað deyðbóltarnir, sum syrgdu fyri, at GÍ vann øll stigini í Runavík*
***Mynd: J. Jacobsen***

NSÍ–GÍ 3–4 (0-2)

Málini boða frá, at tað var rættuliga undirhaldandi í Runavík. Og intensiteturin og dramatikkurin gjørdust ikki minni av, at tað var um reppið, at NSÍ kom afturíaftur, eftir at teir høvdu verið aftanfyri 4–1.

Trý av GÍ málunum vórðu skorað av spælarum, sum undan hesum kappingarárinum hava slitið allar sínar fótbóltsskógvar á vøllinum við Løkin. Hjá spælarunum var tað kærkomið – serliga hjá Óla Hansen, sum skoraði fyri fyrstu ferð í landskappingardysti fyri GÍ.

Sjálvandi iðraðu tey í NSÍ seg. Bæði um at tað skuldi eydnast fyrrverandi NSÍ monnunum at gerast so eyðsýndir og serliga um, at tað enn eina ferð varð staðfest, at tað ofta er soleiðis, at úrtøkan hjá NSÍ er størri á útivølli, enn hon er á heimavølli.

**Illa skipað**
Grannastríð verða sjáldan minst fyri polerað bóltspæl. Uppgerðin í Runavík dýra biðjudag var einki undantak í so máta. Samanhangandi fótbóltsspæli var lítið av. Eftiransingarnar vóru tættar, nærdystirnir vóru nógvir, og tað hevði við sær, at ofta miseydnaðist tað, sum spælararnir høvdu ætlað.

Fyrra umfarið høvdu gestirnir gott tak á, og tá skoraðu teir tvey mál. Í 2. hálvleiki var tað NSÍ, sum hevði yvirtakið. Teir saknaðu leikbannaða bóltspælaran Sjúrða Jacobsen, og heilt tíðliga var Trygvi Mortensen noyddur at umskipa, tí Djóni N. Joensen fór út. Tá fór Jan Nónklett aftur á miðvøllin, og Mortan Hansen kom inn í álopið.

**Deyðbóltarnir eru drepandi**
Tað hevur verið sjón fyri søgn fleiri ferðir í ár, og aftur fríggjadagin varð tað staðfest: NSÍ hevur so stórar trupulleikar í sambandi við innlegg eftir deyðbóltar, at tað higartil hevur kostað teimum eini fimm mál og harvið eisini fleiri stig.

Óli Hansen setti hol á málskjótingina, tá hann við vinstra beini sendi upp undir nettakið aftanfyri gøtumannin, Rúna Joensen, í NSÍ málinum. Støðan uppstóð eftir at Magni Jarnskor hevði sent úr høgru og til handara stólpa.

Og so spældu deyðbóltarnir heimaliðnum fyrsta pussið: Magni Jarnskor sendi horna úr høgru innfyri til Helga R. Petersen, sum við vinstra beini sendi í málið.

NSÍ setti damp undir ketlarnar, tá teir beinanvegin eftir steðgin minkaðu um munin. Uppspælið í høgru var gott, Gert Langgaard spældi út frá í brotsteigin til Ian Højgaard, sum skoraði.

Men syndarligu NSÍ verjuavrikini í sambandi við deyðbóltarnar vóru ikki av. Í øllum NSÍ trýstinum sendi Pauli Jarnskor frísparksbólt frá síðulinjuni í vinstru. Bartal Eliasen, Óli Hansen og aðrir stórir GÍ arar vóru mitt fyri málinum, Rúni Joensen royndi at boksa burtur, men bólturin datt fyri føturnar á Helga R. Petersen, sum lyfti upp um málverjan.

Og tað gjørdist uppaftur verri. Pauli Jarnskor royndi aftur við frísparki úr vinstru, aftur vóru stóru menninir mitt fyri málinum, og hesa ferð slapp bólturin at sigla omanfyri málverjan og dygst undir tvørtrænum.

**Spenningur kom í**
Heimamenninir eiga rós fyri, at teir royndu at koma afturíaftur. Tað kostar nógv sinniliga at hava tiltuskað sær yvirvág – sjálvt um spælið ikki var nakað at reypa av – og alíkavæl at smokka longri niður av ítøkiligum veikleikum.

Men kortini so at siga reittu teir í NSÍ seg upp við hárinum. Teir tóku av, tá gøtumenninir tóktust at hava huganum snaraðum móti fjórðingsfinaluni í steypakappingini. Innskifti Christian Høgni Jacobsen og Gert Langgaard skoraðu báðir, tá teir gjørdust leysir í brotsteiginum, men NSÍ kom ikki nærri.

Burtursæð frá í fyrsta landskappingardystinum hevur GÍ ikki taptí ár, og komandi sunnudag fáa teir nýggjan møguleika at fáa trý stig, tá teir fáa vitjan av HB. Tað kann væl fara at vísa seg, at talan verður um generalroyndina til steypafinaluna.

NSÍ, sum ikki hevur vunnið, síðani teir í fyrsta umfarinum vóru í Klaksvík, skal út at vitja grannarnar á Toftum.

JH

**NSÍ:**
Rúni Joensen – Brynjolvur Nielsen, Kári Hansen, Dánial Hansen, Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen, Djóni N. Joensen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Jan Nónklett, Gert Langgaard

**GÍ:**
Sunvard Joensen – Pól Ennigarð, Bartal Eliasen, Martin Thomsen, Leivur Hansen – Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Pauli Jarnskor – Helgi R. Petersen, Óli Hansen, Henning Jarnskor



*Higartil hava hvalbingar verið eiðasørir, men leygardagin fingu teir so fyrsta stigið á árinunm*
***mynd: Áki Bertholdsen***

# Dansitónleikari hjálpti KÍ

*2. deild: Klaksvíkingar vóru illa mannaðir, tá Royn fekk fyrsta stigið á árinum*

2. deild: Royn–KÍ 0–0

Tað var bygdarstevna í Hvalba dýra biðjudag. Tí var 2. deildardysturin móti KÍ framskundaður. Umframt at spæla um stigini, so var eisini eitt steyp sett upp á spæl. Dysturin endaði málleysur. Liðini fingu eitt stig í part, og kanska oyðiløgdu klaksvíkingar eitt sindur av stevnuhýrinum, tá teir struku avstað við steypinum. Tað gjørdu teir, tí teir vunnu brotssparkskappingina.

Í Runavík næstsíðsta leygardag fekk KÍ málleysan javnleik við at verja og dúva upp á møguleikarnar fyri snarálopum. Uppskriftin var nett tann sama í Hvalba. Úrslitið var eisini tað sama, men fyritreytirnar at røkka úrslitinum vóru heilt øðrvísi.

Tað gekk illa at fáa fólk at fara suður við Claire. Á veg suður vóru teir bara tíggju spælarar. Men lukkutíð fyri klaksvíkingar var dansiorkestrið Kjølar á veg suður at spæla til stevnudans. Guitaristurin Jens Marni Hansen hevur spælt fótbólt á yngri árum. Á veg suður varð hann skrásettur sum KÍ spælari, og sum álopsmaður bant hann ein verjuspælara allar 90 minuttirnar.

Hvalbingar høvdu bóltin so nógv tann størsta partin av tíðini. Teir høvdu nógvar royndir móti málinum, men Meinhard Joensen var tryggur millum KÍ stólparnar.

Í 2. hálvleiki var trýstið stórt. Vilmund Mikkelsen, sum teir í Hvalba hava grivið framaftur, var tætt við, tá hann snaraði kring seg sjálvan og sendi dygst fram við stólpanum. Besti maður á vølli var Gisli Sveinbjørnsson. Hann reikaði nógv og var góður við bóltinum. Ta einu ferðina lobbaði hann upp um KÍ málverjan, men aftasti KÍ maðurin, Andreas Josephsen, bjargaði á mállinjuni.

Ei undur var í, at klaksvíkingar vóru væl nøgdir við javnleikin. Teir vóru illa mannaðir, og meðan teir spældu, vóru bæði Atli Danielsen og Gunnleivur Biskupsstøð plágaðir av skaðum. At Royn ikki megnaði at vinna móti einum sovornum mótstøðuliði sigur eisini, at hvalbingar eru ikki so væl fyri, sum teir onkuntíð hava verið. Stigið móti KÍ var tað fyrsta á árinum, og komandi leygardag fáa teir ein nýggjan møguleika á heimavølli. Tá koma næstbestu gøtumenninir suður. Ivaleyst fara teir at megna at manna lið uttan at verða noyddir at fáa hjálp frá dansitónleikarum!

JH